## Kendur bókahandil letur upp aftur

Bókagarður, sum hevur litið stillur í næstan 10 ár, hevur nú latið upp aftur við bókasølu við føroyskum bókum. Bókagarður er eitt tað elsta føroyska bókaforlagið, sum hevur givið út ein hóp av bókum og sum áður hevur havt bókaútsølu í miðbýnum í Havn og í Eysturbýnum. Men fyri einum 8-10 árum síðani varð hann latin aftur, men er nú byrjaður av nýggjum í Bringsnagøtu í Havn. Umframt bøkurnar frá forlagnum sjálvum, selur Bókagarður tær nýggjastu føroysku bøkurnar, ið eru komnar í ár. Ætlanin er, at Bókagarður skal vera handilin sum hevur størsta úrval av føroyskum bókum, nýggjum og antikvariskum, verður sagt í tíðindaskrivi. Tað var Emil Juul Thomsen, sum á sinni fór undir Bókagarð og nú hann letur upp aftur, er tað sonur hansara, Bjørn, ið stendur fyri handlinum.



## Kalt í Danmark

Tað hevur verið rættiliga kalt í Danmark hesa vikuna, og gjáranáttina frysti næstan 19 stig har eysturi í Jyllandi. Danska veðurstovan sigur, at í Horsens vóru 18,9 kuldastig beint eftir midnátt fyrrarkvøldið, og hetta er mesti kuldi, sum er máldur í Danmark síðani í mars í 2005, tá tað frysti 20,7 stig. Enn restar tó nakað í at taka tað gamla kuldametið fyri desember. Tað er 25,6 kuldastig og er frá 1981. Men á Bornholm hevur kuldin sett nýtt met. Har vóru 6,7 kuldastig fyrramorgunin, og tað er mesti kuldi, sum er máldur har í desember síðani 1874, sigur TV2.

# Gerhard Lognberg blotnaður

**Slagið um undirsjóvartunnilin í Sandoynna er ikki tapt enn, sigur hann**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Eg vil heldur vera í Samgonguni og royna at bjarga stumpunum, sigur Gerhard Lognberg, sum sostatt ikki ætlar sær at rýma úr eini samgongu afturat, hóast onki verður sett av til Sandoyartunnilin*

Gerhard Lognberg rýmir ikki úr samgonguni, hóast hann ikki fekk eitt oyra til Sandoyartunnilin á fíggjarlógini fyri næsta ár.

Tað ger hann greitt, nú tað stendur svart á hvítum, at onki verður gjørt við Sandoyartunnilin næsta ár, hóast tað stendur í samgonguskjalinum.

Hann heldur nevniliga ikki, at øll vón er úti enn.

Gerhard Lognberg hevur annars fyrr gjørt Sandoyartunnilin til eitt samgongumál og fyri hálvum øðrum ári síðani segði hann seg úr CHE samgonguni, tí hon ikki vildi seta pening av til Sandoyartunnilin.

Og nakað síðani staðfesti hann eisini, at vil heldur ikki hendan samgongan fara undir Sandoyartunnilin næsta ár. Fór hann at koma við eini kraftigari fráboðan, sum hann málbar seg.

### Blotnaður

Men síðani er hann blotnaður eitt sindur, tó hóast tað er greitt, at onki verður sett av til Sandoyartunnilin næsta ár, boðar hann nú frá, at hann ætlar sær at verða verandi í samgonguni og har ætlar hann sær at stríðast víðari.

Hann hevur vigað fyri og ímóti og hann heldur, at sum støðan er nú, er tað betri at verða verandi í samgonguni og hava ávirkan, enn at stinga í sekkin og frásiga sær alla ávirkan.

Hann heldur nevniliga ikki, at slagið er endaliga tapt enn. Og tað, hann nú setir sítt álit á, er, at samgongan hevur avtalað, at longu tíðliga næsta ár skal ein langtíðarætlan íløguætlan leggjat og har fer Gerhard Lognberg at halda fram við stríðnum fyri Sandoyartunlinum.

- Eg ætli mær at vera við fyri at vita, hvussu tann leikur ferð, sigur løgtingsmaðurin úr Skopun.

Hann vísir á, at seinast hann rýmdi úr samgonguni í sambandi við tunnilin, fekk hann onki burtur úr tí.

Hann vísir eisini á, at ágangurin á Suðurøkið í Føroyum, Sandoy og Suðuroy, er so stórur í sambandi við ferðasamband og annað, at hann heldur, at hann tænir samlaða málinum best við at verða verandi í samgonguni.

Hann tekur sær eisini sín part av heiðrinum fyri, at ferðaætlanin hjá Strandferðsluni ikki verður skerd so nógv, sum upprunaliga ætlað og at príshækkingin heldur ikki verður so stór sum ætlað.

Hann fegnast eisini um, at ítróttarhøll verður bygt í Sandoy. Men tað skal ongin billa sær inn, at tað verður góðtikið at sandoyingar verða egndir við eini ítróttarhøll við tí fyri eyga at fáa teir at gloyma tunnilin ella havnina í Skúvoy.

# Føroyingar eiga ársins virki í Litava

**Føroysk vitan gjørd allan munin, tá ið Litaviski forsetin fyri Vinnu og Ídnað valdi ársins virki í Litava**

ÁRSINS VIRKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Føroyska virki, sum er komið í fremstu røð í Litavia, virkar fisk fyri viðskiftafólk í Evropa og Russlandi og framtíðarútlitini eru góð. Savnsmynd*

Eitt virki, sum føroyingar eiga, er kosið til ársins virki í Litava.

Tað var í bólkinum fyri fyritøkur við 50 til 250 fólkum í starvi, at fyritøkan Plunges Saltis fór avstað við heiðrinum sum ársins virki.

Virki, sum føroyingar eiga allan partapeningin í, virkar og pakkar fisk til marknaðin í Evropa og í Russlandi.

Orsøkin til at Plungis Saltis varð valt til ársins virki, er at tað hevur stak góða leiðslu, sølu, marknaðarføring og hevur sett munagóðar skilabøtur í verk, sum alt samalt hevur havt við sær, at fyritøkan fær avlop í ár fyri fyrstu ferð síðani 1996, sigur Jóhannes Martin Hansen, stjóri í manage Ltd, sum eigur 100 prosent av partabrøvunum í Plunges Saltis, í tíðindaskrivi.

- Hetta er ein sera stórur heiður fyri okkum, serstakliga tá ið hugsað verður um, at einar 2500 fyritøkur eru at velja ímillum í bólkinum av fyritøkum, ið hava millum 50 og 250 starvsfólk, leggur hann afturat.

### Framleiðslan økt munandi

Síðani 2006 hevur Plunges Saltis trýfaldað framleiðsluna á virkinum úr 1600 til 5300 tons.

- Hetta er eydnast við at gagnnýta føroyska framleiðsluvitan, fíggjarstýring og dygdargóða marknaðarføring.

- Men eisini dugnaligu litavisku starvsfólkini og virkisleiðslan eiga ein stóran part av heiðrinum.

Plunges Saltis keypur ikki fisk, men virkar fisk fyri viðskiftafólk í Evropa og Russlandi, sum rinda fyri lønarbeiði og aðrar tænastur.

- Leggjast kann afturat, at virkið tað einasta í Litava, ið hevur góðkenning at selja úrdráttir úr botnfiski til Ruslands

Teir hava eisini góðar vónir fyri næsta ári

Líkt er til, at 2010 verður eitt gott ár fyri Plunges Saltis, har 220 fólk arbeiða.

- Næsta ár fáa vit fullan ágóða av skilabøtunum og tí meta vit, at framtíðarútlitini eru góð, sigur hin høvuðsmaðurin aftanfyri virkið, Arni Carlsen.